

*Sigurð í Jákupsstovu er fyribils stjóri á Jarðfrøðisavninum í tvey ár.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

# Tolið bjartskygni

**Stjórin á Jarðfrøðisavninum, Sigurð í Jákupsstovu, er verkfrøðingur á Ph.D stigi við serfrøði innan oljuframleiðslu, íroknað drúgvum praktiskum royndum frá boripallum**

KOLVETNISTØKNI
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Teir seinastu fýra mánaðirnar, og teir komandi tjúgu, er stjórin á Jarðfrøðisavninum ikki jarðfrøðingur. Hann er hinvegin verkfrøðingur og Ph.D innan kolvetnistøkni, nevniliga 40 ára gamli Sigurð í Jákupsstovu. Hann avloysir Martin Heinesen sum hevur farloyvi vegna serliga arbeiðsbyrðu í sambandi við fyrireikingar til landgrunskrøv uttan fyri 200 fjórðinga fiskimarkið.

Sigurð í Jákupsstovu skrivaði millum 1998 og 2002 sína doktararitgerð, undir heitinum "Simulation of Gas Injection Processes" og vardi hana við Danmarks Tekniska Universitet fyri einum lítlum ári síðani. Tíggju ár frammanundan fekk hann sum útbúgvin maskinverkfrøðingur arbeiði hjá Mærsk Olie & Gas og har arbeiddi hann fyrst sum Well Site Engineer og seinni sum kolvetnisverkfrøðingur; hann starvaðist í Danmark umframt í Miðeystri og Fjareystri.

"At vera Well Site Engineer er ofta tað fyrsta arbeiði ein fær sum verkfrøðingur hjá einum oljufelag," greiðir Sigurð í Jákupsstovu frá. "Arbeiðið er praktiskt orienterað, eitt slag av 'learning by doing' sum her merkir at seta seg inn í og samskipa arbeiði á einum boripalli. Tað er sjálvandi ógvuliga lærurikt og kanska heldur strævið í longdini, men eg flutti jú upp í hierarkiinum aftan á eina tíð – og eg eri nú sera takksamur fyri royndirnar."

## Áhugaverd leiting

Ph.D verkætlanin, sum varð fíggjað av Granskingarráð Føroya og Nordisk Energiforsknings Programmer, snúði seg um teldusimuleringar av gassinnspræning í sambandi við oljuframleiðslu – eitt øki sum Sigurð í Jákupsstovu hevur royndir við frá starvstíðini hjá Mærsk.

"Hjá oljufeløgum ræður um at fáa sum mest burtur úr einari oljugoymslu," vísir Sigurð í Jákupsstovu á. "Tað kostar nógv at útvinna oljuna og tað arbeiðið má, bæði tekniskt og búskaparliga, gerast upp á ein so munadyggan og skilagóðan máta sum møguligt."

"Í nógvum førum verður gass og/ella vatn sprænt niður í kelduna fyri at økja um framleiðsluna við at gagnnýta fysiskan og kemiskan skiftivirknað millum løg og goymslugrýti. Í samband við útbygging av einari oljuleið er umráðandi at kunna gera álítandi forsagnir fyri kolvetnis framleiðsluni og hvørja ávirkan innspræning av vatn ella gass kann hava; hetta er í stuttum tað sum eg arbeiddi við í mínari Ph.D verkætlan…"

*Tú hevur við øðrum orðum sæð rættiliga fitt av aktión… Kennist tað ikki keðiligt at koma til Føroya og innstilla seg upp á leitivirksemi?*

"Eg haldi at leitiarbeiði er sera áhugavert… Hvør veit hvat sum fer at henda í Føroyum? Vit eru stutt síðan byrjaði at leita, fyrstu loyvini vórðu givin í august 2000. Til samanberingar kann nevnast at BP fann ta stóru 'Claire' kelduna vestan fyri Hetland í 1977, og ikki fyrr enn nú verður hon sett í framleiðslu. So perspektivini eru long og Atlantsmótið kemur uttan iva í nógv ár at verða roknað sum eitt áhugavert øki millum oljufeløgini."

## Nýggj loyvi skjótt

Ein avbjóðing í sambandi við leiting í Føroyum er basaltfláirnar, sum í fyrstu atløgu tarna seismiska kanningararbeiðið og í aðru atløgu kunnu verða truplar at bora ígjøgnum.

"Nógv spennandi arbeiði fer fram í verkætlanum sum seta serligan fokus á júst hesar spurningar við atliti til at menna nýggja tøkni, soleiðis at jarðfrøðin undir basaltinum kann kortleggjast neyvari og boringar leggjast betur til rættis."

*Men øll eru kanska ikki líka optimistisk?*

"Fólk eru sjálvandi av ymiskari uppfatan um hvørjir teir realistisku møguleikarnir eru… Okkara uppgáva er at vísa á at møguleikarnir eru fleiri á tí føroyska økinum. Leitingin higartil hevur verið fokuserað upp á eina skipan í tí sunnaru leiðini har lítið og einki basalt er. Aftaná at fýra brunnar eru boraðir kann staðfestast at vit hava eina virkna kolvetnisskipan. Amerada Hess brunnurin boraði ígjøgnum 170 metrar av fláum sum innihalda kolvetni. Enn eru fýra brunnar eftir at bora í sambandi við fyrsta loyvisumfar; teir fara at geva okkum meira vitan um møguleikarnar í tí sunnara økinum. Harumframt vænta vit at annað loyvisumfar, og arbeiðið sum verður gjørt í samband við 9 ára loyvini, fer at viðvirka til at onnur økir og aðrar jarðfrøðiligar skipanir verða kannað – her finnast eftir okkara tykki stórir møguleikar."

Sigurð í Jákupsstovu vísir á at vit eru bara komin í helvt í okkara fyrsta leitiumfari og at vit hava allar orsøkir til bjartskygni – tað er, tolið bjartskygni.

Fyrsta loyvisumfar gongur út um miðjan august í 2006; innan tess skulu fýra royndarboringar afturat gjøgnumførast. Annað loyvisumfar verður í løtuni fyrireikað.

"Vit arbeiða við øðrum umfari og væntandi kunnu vit skriva loyvini við árslok 2004," upplýsir Sigurð í Jákupsstovu.



Kári Højgaard hyggur frameftir:

# – Enn hava vit ikki mist mótið

**– Stóri trupulleikin er tann, at tíðarbilið er vorðið ov langt. Tað skuldi verið kravt, at meiri ferð varð sett á, soleiðis at vit varðveittu ta vitan, sum vit hava arbeitt upp á oljuøkinum. Her hugsi eg bæði um føroyskar fyritøkur og eisini tey, sum hava veitt cathering og veitt tænastur í útgerðarhavnini. Tí fer henda vitanin fyri bakka, so eru vit illa fyri heldur Kári Højgaard, ein av undangongumonnunum í oljuvinnuni á Skálafjørðinum**

UNDANGONGUMAÐUR
*Jan Müller*

Ein av teimum, sum hevur fylgt við oljumenningini nær sagt frá byrjan er Kári Højgaard, í dag løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin. Sum lokalpolitikari í Runavíkar Kommunu, hevur hann luttikið í nógvum av oljuráðstevnunum, sum verið hava í Stavanger og Aberdeen upp gjøgnum øll 90 árini. Og hann hevur so eisini verið ein av heitastu talsmonnunum fyri at fáa útgerðarhavnina til Runavíkar. Ta søguna kenna vit – har tað loksins eydnaðist at leggja tí fyrstu oljuútgerðarhavnina nakrantíð í Runavík. Og vit kenna so eisini víðari tilgongdina, sum kanska ikki hevur verið alt ov positiv, nú fýra brunnar eru boraðir og einki lønandi fund enn er staðfest og har tað ganga í hvussu er tvey ár, áðrenn nakað virksemi verður aftur í Runavík.

Kári Højgaard var eisini við á oljuráðstevnuni í Aberdeen herfyri. Heimaftur komin staðfestir hann, at tað er lítil fokus og áhugi fyri Atlantsmótinum sum støðan er í løtuni, tó at feløg hava bundið seg til at bora tilsamans átta brunnar á landgrunninum.

- Tað er hugstoytt at síggja, at vit longu hava borað helvtina av brunnunum, og at spenningurin er minkaður. Hinvegin vita vit, at olja og gass eru staðfest í undirgrundini. Enn hava vit ikki mist mótið. Men stóri trupulleikin er tann, at tíðarbilið er vorðið ov langt. Tað skuldi verið kravt, at meiri ferð varð sett á, soleiðis at vit varðveittu ta vitan, sum vit hava arbeitt upp á oljuøkinum. Her hugsi eg bæði um føroyskar fyritøkur og eisini tey, sum hava veitt cathering og veitt tænastur í útgerðarhavnini. Tí fer henda vitanin fyri bakka, so eru vit illa fyri. føroysku undirgrundini. Og vit vita, at tað eru fýra leitiboringar eftir.

Men Kári Højgaard hevur ikki mist mótið fyri tað. Hann er bjartskygdur og tolin maður av lindi og heldur tað man fara at ganga rætta vegin. Hann dugir ikki at síggja nakra orsøk til tess, tá oljufeløgini enn trúgva uppá tað. Vit vistu, at sannlíkið fyri at finna olju var sera lítið, og hyggja vit til Noregs, so vórðu boraðir nógvir brunnar, áðrenn nakað veruligt var funnið.

Kári Højgaard sigur seg annars vera sera spentan um, hvat Amerada Hess veruliga hevur funnið í Marjunbrunninum.



*Kári Højgaard hevur ognað sær vitan um oljuvinnuna á mongum oljumessum. Her er hann við á oljumessuni í Aberdeen herfyri*

*Mynd Jan Müller*




